JAVNSTØÐA

Lagt til rættis: Rigmor Dam • Kelda: www.javnratt.fo



# Menn duga betur at netverka

**Fjórði hvør danski maður hevur fingið arbeiði gjøgnum kenningar, meðan tað sama bara er galdandi fyri fimtu hvørja kvinnu.**

Mannfólk duga betur enn kvinnurnar at gera sær dælt av vina- og kenningasambondum, tá teir søkja starv. Sambært danska blaðnum Inginiøren hevur fjórði hvør maður fingið arbeiði gjøgnum kenningar, meðan tað sama bara er galdandi fyri fimtu hvørja kvinnu. Í staðin velja kvinnurnar at svarar starvslýsingum.

Tveir av trimum monnum, sum hava fingið starv seinasta árið, hava antin fingið starvið gjøgnum kenningar, við at venda sær beinleiðis til arbeiðsplássið ella við at vera headhuntaðir. Hetta er bert galdandi fyri helvtina av nýsettu kvinnunum, vísa tøl frá Danmarks Statistik.

Triðja hvør kvinna og fjórði hvør maður fær starv umvegis starvslýsingar, og jútlendingar netverka sum heild meira enn sælendingar.

# Endurgjald fyri mismun vegna kyn

**Ein kvinnuligur verkfrøðingur í Danmark hevur fingið eina mánaðarløn á 42.401 kr. í endurgjaldi, tí hon varð vrakað vegna kyn**

Endurgjaldið varð Sambært amerikonsku fyritøkuni TA Instruments hvørki kunnu ella vilja kvinnur átaka sær nógva ferðing í einum starvi.

Hetta mátti ein donsk kvinna ásanna, tá hon søkti starv í amerikonsku fyritøkuni TA Instruments, umvegis eina belgiska fyritøku, ið útvegar starvsfólk.

Starvið kravdi nakað av ferðing, og hóskaði tað henni væl. Fyrsta samrøðan gekk somikið væl, at hon varð rópt inn til enn eina samrøðu. Men við stuttum skotbrái var samrøðan avlýst, við teirri umbering, at tað lá ikki fyri hjá arbeiðsgevaranum at vera til staðar.

### Hoyrdi onki aftur

Sum tíðin fráleið undraði tað kvinnuna, at hon onki hoyrdi aftur. Tí setti hon set í samband við belgisku fyritøkuna, sum skuldi útvega henni starv. Haðani fekk hon boðini, at hon ikki hevði fingið starvið, tí TA Instruments hevði funnið út av, at hon var kvinna. Sambært TA Instruments hvørki kunnu ella vilja kvinnur átaka sær so nógva ferðing, sum starvið kravdi. Tí metti fyritøkan tað ikki vera nyttuleyst at hitta hana aftur.

### Eina mánaðarløn

Kvinnan setti seg síðan í samband við IDA, sum er felagið hjá donskum verkfrøðingum, sum hjálpti henni at krevja endurgjald við støði í javnstøðulógini. Niðurstøðan var, at kvinnan skuldi hava løn svarandi til eina mánaðarløn: 42.401 krónur.

TA Instruments vísa aftur, at tey gera mismun vegna kyn. Tey vísa á, at tey hava fleiri kvinnur í arbeiði, eisini hav nógv ferðing krevst. Tí man tað vera belgiska fyritøkan, sum hevur mistikið seg í hesum føri, halda tey.

# Alt fleiri kvinnuligir leiðarar í Danmark

**Næstan triði hvør nýsetti leiðari er kvinna, vísa tøl hjá Ledernes Hovedorganisation.**

30 prosent av teimum, sum í fyrru helvt av 2007 teknaðu seg sum lim í Ledernes Hovedorganisation, eru kvinnur. Til samanberingar vóru bert 9 prosent av nýggju limunum kvinnur í 1982.

- Tað er fantastiskt, at vit hava fingið so nógvar nýggjar kvinnuligar leiðarar, sigur Trine Thorning, deildarleiðari í Lederes Hovedorganisation. Hon heldur, at orsøkina til gongdina er at finna í orðaskiftinum, sum hevur verið seinastu árini, har fokus hevur verið sett á fjølbroytni í leiðsluni, skrivar Idag.dk

- Soleiðis hava kvinnurnar fingið meiri dirvi til at átaka sær leiðsluna, og mannfólkini eru eisini vorðnir dugnaligari at seta kvinnurnar í starv, sigur sigur Trine Thorning.

# Kvinnur skulu gjalda minni í skatti

Hetta er nýggjasta uppskotið hjá tveimum italskum professarum í búskapi. Teir skjóta upp, at kvinnur gjalda minni og menn meira í skatti, soleiðis at bæði kynini hava somu nettoløn eftir.

Í Italia svarar hetta til, at kvinnurnar bara rinda 70 prosent av tí, sum menninir rinda í skatti, tí lønin hjá italsku kvinnunum er 70 prosent av lønini hjá monnunum, skrivar heimasíðan hjá www.kvinfo.fo.

Danskir javnstøðuserfrøðingar siga seg ivast í, um hetta er rætta loysnin.

– Hetta fær tað at síggja út sum natúrligt, at kvinnur fáa lægri løn enn menn, heldur Karen Sjørup, leiðari á Center for Ligestilling á RUC.

– Um vit læsa okkum føst í hesa støðu, koma vit ongan veg, sigur hon.

# Fleiri kvinnuligir verkfrøðingar á veg

Heili 30 prosent av teimum, sum eru sloppin inn at lesa sivilverkfrøði í ár, eru kvinnur. Talið á kvinnum, sum lesa til sivilverkfrøðing er sostatt hækkað við 20 prosentum seinastu tvey árini, skrivar Ingeniøren.